# Darwinisman í andgletti: Spurnartekin við vísindaliga støðið

Richard Schwartson



Kansas Board of Education setur spurnartekin við evolusjónslæruna

Týsdagin í hesi vikuni samtykti nevndin fyri skúlaverkið í statinum Kansas í USA at broyta námssetningin í vísindi. Næmingar í øllum skúlum í Kansas skulu framyvir verða kunnaðir um veikleikar við evolusjónslæruni (menningarástøðinum, darwinismuni). Sostatt er Kansas fimti amerikanski staturin, sum í frálærutilfarinum setur spurnartekin við vísindaliga støðið í evolusjónslæruni. Hinir statirnir eru Ohio, Pennsylvania, Minnesota og New Mexico.

### Námssetningurin fyri vísindi

Á heimasíðuni http://www.ksde.org/outcomes/scstdworkingdoc892005.pdf stendur soleiðis um nýggja námssetningurin fyri undirvísingina í vísindi:

'Regarding the scientific theory of biological evolution, the curriculum standards call for students to learn the best evidence for modern evolutionary theory, but also to learn about areas where scientists are raising scientific criticisms of the theory...Evolution is accepted by many scientists but questioned by some. The Board has heard credible scientific testimony that indeed there are significant debates about the evidence for key aspects of chemical and biological evolutionary theory. We therefore think it is important and appropriate for students to know about these scientific debates and for the Science Curriculum Standards to include information about them. '

Føroyskað: 'Viðvíkjandi vísindaliga ástøðinum um livfrøðisliga menning, so verður í námssetninginum ásett, at næmingar skulu verða lærdir um bestu prógvini sum menningarlæran í dag byggir á, men hinvegin eisini skulu verða lærdir um tey øki, har vísindafólk hava vísindaligar atfinningar móti ástøðinum...Evolusjón verður góðtikin av nógvum vísindafólki, meðan summi seta spurnartekin við evolusjónsástøðið. Nevndin hevur hoyrt sannførandi vísindaligar frágreiðingar um at tað er týðandi ósemja millum vísindafólk, tá talan er um evnafrøðiliga og lívfrøðiliga menningarástøðið. Vit meta tí, at tað er av týdningi og eisini hóskandi, at næmingar eru vitandi um vísindaligu ósemjuna á hesum øki, og at námssetningurin í vísind tekur hædd fyri hesum.'

Orðingin í námssetninginum um evolusjónslæruna er soljóðandi:

'The view that all living things in all the major kingdoms are modified descendants of a common ancestor (described in the pattern of a branching tree) has been challenged in recent years by:

1. Discrepancies in the molecular evidence (e.g. differences in relatedness inferred from sequence studies of different proteins) previously thought to support that view.

2. A fossil record that shows sudden bursts of increased complexity (the Cambrian Explosion), long periods of stasis and the absence of abundant transitional forms rather than steady gradual increases in complexity, and

3. Studies that show animals follow different rather than identical early stages of embryological development.

Some of the scientific criticisms include:

1. A lack of empirical evidence for a 'primordial soup' or a chemically hospitable pre-biotic atmosphere;

2. The lack of adequate natural explanations for the genetic code, the sequences of genetic information necessary to specify life, the biochemical machinery needed to translate genetic information into functional biosystems, and the formation of proto-cells, and

3. The sudden rather than gradual emergence of organisms near the time that the Earth first became habitable.

Føroyskað: 'Tey seinnu árini er ivaspurningar settir til ákoðanin um, at allar livandi verur eru eftirkomarar frá eini og somu veru (lýst við greinaðum ættartræi):

1. Ósamsvar í prógvunum innan molekylerbiologi (t.d. munir í bygnaði av eggjahvítaevnum) sum annars skuldu stuðla evolusjónslæruni.

2. Leivdir av samansettum steinrenningum (fossilum) koma knappliga í ljósmála ('Kambriski bresturin'), long tíðarskeið har onki hendir, ongi millumsløg av týdningi finnast, har tað átti at verið ein glíðandi yvirgongd til tey meiri samansett sløg, og

3. Kanningar vísa, at fostur hjá ymsum dýrum menn-ast ymiskt.

Nakrar av vísundaligu atfinningunum eru:

1. Ongi prógv fyri 'ursuppuni', ella eini evnafrøðisliga liviligari atmosferu.

2. Væntandi nátúrlig frágreiðing um arvakotuna, um raðfylgjuna av genetisku informatiónini sum er neyðug fyri at lív kann spyrjast burturúr, um biokemisku verksmiðjuna, sum er neyðug fyri at umseta genetisku informatióna til virknar lívfrøðiligar skipanir, og um hvussu proto-kyknurnar eru íkomnar, og

3. at verur knappliga koma til sjóndar, heldur enn líðandi, tá jørðin gjørdist livilig.

### Intelligent Design og neo-darwinisma

Tað er sjálvandi ikki fallið í góða jørð hjá viðhaldsfólki hjá darwinismuni, at skúlaverkini í fimm statum seta spurnartekin við evolusjónslæruna í undirvísingini. Tað er heldur onki at dylja yvir, at darwinistarnir síggja Intelligent Design (ID) viðhaldsfólkini sum høvuðsfíggindan, tí tað er teimum fyri at takka, at henda fyri læru darwins óhepna broyting er komin í námssetningin. Álopini á Intelligent Design rørsluna eru tí nógv í hesum døgum, geva seg til kennar á ymiskan hátt. Eitt ítøkiligt dømu er 'kanningin', sum darwinisturin Gregory S. Paul hevur gjørt, og sum hevur eittans endamál, at niðurgera tey kristnu, og tá serliga ID fólkini. Meir um hetta seinni.

# Spurningar til Jákup Mikkelsen

Eivind Ortind Simonsen
*Viby J*

Birita L. Jóansdóttir
*Álborg*

Í fjølmiðlunum er komið framm, at Fólkaflokkurin ikki vil taka undir við uppskotinum hjá Anitu á Fríðriksmørk og Finni Helmsdal um, at í Føroyum eigur man ikki at kunna gera mun á fólki vegna kynsliga sannføring. Frammsøgumaðurin hjá Fólkaflokkinum - Jákup Mikkelsen - segði í hesum sambandi, ífylgi heimasíðuni hjá Útvarpi Føroya: "Tað er ikki rætt at løggeva fyri ein einstakan bólk. Og harafturat er tað ímóti kristnu siðalæruni at vera samkyndur". Hann skeyt uppí, at persónliga stúrdi hann fyri, at um hetta uppskotið bleiv samtykt, so vildi tað næsta verða skrásett parlag og at samkynd vildu kunna sleppa at ættleiða børn.

Í hesum sambandi hava vit nakrar spurningar til Jákup Mikkelsen.

1) Fyri 10 árum síðan var tað soleiðis í Føroyum, at bert prestar og politiovastar kundu víga hinkynd hjún. Fyri nøkrum árum síðan bleiv hendan lógin broytt, so at eisini samkomuleiðarar í øðrum samkomum, enn fólkakirkjuni, høvdu loyvi til at víga hjún. Her er greitt talan um eina lóg, sum bert kemur einum ávísum, og enntá lítlum bólki í samfelagnum, til góðar. Nemliga samkomuleiðarum og teimum fólkum, sum vilja giftast í samkomum. Ífylgi tínari útsøgn um, at tað er skeivt at gera lógir, ið bert galda fyri einstakar bólkar í samfelagnum, hvussu vil Fólkaflokkurin so bera í bandi, at hendan lóg, sum skjótast, verður avtikin?

2) Uppskoti leggur upp til, at tað ikki skal kunna gerast munur á fólki vegna kynsliga sannføring. Tvs. at ongin persónur, sum hevur eina sexuella preferancu, skal kunna diskriminerast orsaka av sínum sexualiteti. Mær vitandi, hava øll fólk eina ella aðra sexuella preferancu. Dømi: summi av okkum dáma onkrum av hinum kyninum, summi dáma at blíva píska, onnur dáma at lata seg í leðurklæðir og uppaftur onnur dáma ein av egna kyni. Tá tað kemur til sexuella preferancu (kynsliga sannføring) so eru vit ógvuliga ymisk sum menniskju. Tað einasta vit hava til felags er stórt sæð tað, at vit hava eina sexuella preferancu! Okkara spurningur er so tann: Hvussu kann Fólkaflokkurin pástanda, at hetta lógaruppskot bert geldur fyri ein ávísan bólk í samfelagnum? Umfatar heitið "kynslig sannføring" ikki allar føroyingar, ella kanst tú kanska nevna ein føroying, sum ikki hevur eina kynsliga sannføring?

3) Tað er rætt, at tað at vera samkyndur stríður ímóti bibliuni og tí kristnu siðalæruni. Tað er tí bara at gleðast um, at politikarar í Føroyum lata sítt lógararbeiði stýra av, hvat ein 2-3000 ára gamal tekstur, tvs. biblian, hevur at siga. Samfelagi er jú ikki broytt serliga nógv hesi seinastu 1000 árini. Tað er tó at harmast um, at verandi løggáva í Føroyum ikki heilt samsvarar við bibliuna. Ella enn verri: Í fleiri førum er ongin lóg gjørd, sum tekur hædd fyri summum av forskriftunum í bibliuni. Eg kann heilt stutt geva nøkur dømi:

• Neyðtøka: Í Føroyum hava vit í dag eina lóg, sum greitt sigur, at verður ein kvinna neyðtikin, so skal brotsmaðurin revsast við fongsli (§216-217 í revsilógini). Hetta stríður jú greitt ímóti bibliuni, tí lesa vit í 5. Mósebók 22:28-29, so stendur, at um maður neyðtekur kvinnu - og onkur uppdagar tað (!) - so skal hann betala eina bót til pápan og annars gifta seg við kvinnuni. Hetta samsvarar jú aldeilis ikki við verandi løggávu. Í dag kunnu menn blíva dømdir uppá teknisk prógv, sum prógva at teir framdu illgerðina. Tað er í fáum førum, at eygnavitni eru til eina neyðtøku.

• Trælahald: Biblian sigur jú greitt, at kann keypa trælir frá fólkum, ið búgva tætt við ein sjálvan (3. Mós 25:44). Um man hevur eina dóttir,so kann man eisni selja hana til trælahald, um man nú stendur og manglar nakrar krónur (2. Mós 21:7). Trælirnir skullu eisini skikka sær pent (Ef 6:5 og Kol 3:22). Verandi løggáva sigur tíverri onki um hetta evni. Hevði tað ikki verið eitt uppskot, at sett ein trælamarknað á stovn í Føroyum? Møguliga í samband við Virðisbrævamarknað Føroya? Hetta vildi jú verið í samsvar við bibliuna og tað kristnu siðalæruna og vit ivist onga løtu í, at fleiri føroyingar høvdu gleðiliga tikið ímóti hesum møguleikanum fyri at forvunni sær nakrar eyka krónur, nú tann fíggjarliga støðan í landinum er heldur tronglig.

• Siðalæra: Tann kristna siðalæran hjá teimum fyrstu kristnu var soleiðis, at øll áttu alt í felag (Ápos 2:44-45). Man gav tað man hevði til samfelagið og brúkti tað man hevði brúk fyri. Tvs. eitt slag av einum kommunistiskum paradís. Okkara samfelag í dag er alt annað enn hetta fyrsta kristna samfelagið. Summir vinnulívsmenn - eru teir nevndir, so eru teir kendir - ríka seg sjálvan upp, og gera greitt ímóti hesi fyrstu kristnu siðalæruni! Tað kann ikki vera rætt, um okkara samfelag skal samsvara við bibliunnar orð og siðalæruni í henni.

Hetta vóru so nøkur fá dømi. Vit hava ein fullfíggjaðan lista yvir lógir í føroyska lógarverkinum, ið ikki samsvara við bibliuna, og hendan lista vilja vit heldur enn fegin útflýggja til tín ella Fólkaflokkin, um tað er soleiðis, at tit, sum flokkur, ikki sjálv eru greið yvir, hvørjar broytingar eru neyðugar. Okkara spurningur til alt hetta er hesin: Hvat vil Fólkaflokkurin gera fyri at broyta verandi løggávu soleiðis, at hon samsvarar betri við bibliuna og tað kristnu siðalæruna?

Hetta vóru so spurningarnir, til almennu útsøgnina hjá frammsøgumanninum í Fólkaflokkinum. Vónandi kunnu vit vænta eitt svar innan alt ov nógv tíð er umliðin. Svari má gjarna innihalda eitt uppskot til eina tíðarætlan fyri, hvussu verandi løggáva skal broytast, so hon samsvarar betri við tær góðu leiðbeiningarnar í bibliuni. Okkum vitandi, so úttalaði landstýrismaðurin í mentamálum - Jógvan á Lakjuni - á sinni, seg alment um, at "í Føroyum skuldi ongin lóg viðtakast, sum stríddi ímóti móselógini". Í so fall, so hevur hann sikkurt okkurt gott uppskot til, hvussu hetta kann fremjast í verki.

Vit hava ein síðsta spurning til Jákup Mikkelsen, og hendan spurning vænta vit, at tú svarar persónliga, tí hann er viðvíkjandi tíni persónligu støðu í hesum málið. Tú segði, at tú hevði ótta fyri, at um hetta uppskot bleiv viðtikið, so vildu onnur koma, sum vóru hvaðan verri. Er tað veruliga soleiðis, at tá tú skalt taka eina støðu fyri/ímóti einum lógaruppskoti, so velur tú ikki at hyggja eftir, hvussu relevant hetta lógaruppskot er, men ístaðin at fokusera uppá, hvat møguliga kann henda eina ferð í frammtíðini? Eiga lógaruppskot ikki at viðgerast óavhengugt av hvørjum øðrum?